

*Ein av fáu løtunum Egil sleppur út í tún hittir hann Breidal, fotografin, sum nógv enn kennast við Fornminnissavnið 3350F66597*



*Elspa Sloan kemur eisini inn á gólvið hjá Egili. Viðhvørt hevur hon døtur við sær*

Hetta váttar enn einaferð eitt serligt samband og eina serliga umsorgan fyri hesum unga drongi, sum tey ikki eru í ætt við.

Anna Malena f. Hansen, sum hon skrivaðist, var ættað úr Lorvík, fødd um 1850. Hon er seinna kona tann eitt ár yngri Albert Matras. Hann róði út, men á vári 1911 slóð hann út av motorbátinum Jarnheysur.

Tey fingu fimm børn, og tey vóru:

**Johannes** f. 1884. Hann giftist við Thomasiu Johannu Andreu Daniellu Nicolinu Samuelsen. Hon var uppkallað eftir manningini á Stangarbátinum, sum øll, uttan pápi, hennara gekk burtur í 1907. Tey fingu 12 børn. Ein abbasonur er kendi listarmálurin Amaliel Norðoy.

**Olevina** f. 1886. Hon fór ung út at sigla sum kahúttsjomfrú og giftist í Ålborg. Haðani flutti hon fyrst til Canada og síðan til USA.

Tvey tey yngstu børnini Hans Erik Johan og Henrikka doyðu ung.

Triðja barnið í røðini var Anna Julina Malena f. 1890, og hon giftist við Sørin á Krákusteini. Tey fingu fimm børn:

**Albert**, uppkallaður eftir abbanum í Klaksvík, f. 1913, sum longu er umrøddur.

**Charlotta** f. 1915, uppkallað eftir ommuni í Dali í Havn. Hon vitjar eisini ofta Egil saman við foreldrunum. Charlotta var gift við Mads Winther Hentze av Sandi, og tey fingu børnini Andre f. 1936, Øssur f. 1938, Carolina f. 1940, Astrid f. 1941, Bodil f, 1944, Torfinn f. 1946, Svanhild f. 1950 og Nancy f. 1954.

**Petur Hans** f. 1919 var ógiftur.

**Anna Malena**, f. 1922, upkallað eftir ommuni í Klaksvík, sum vitjaði Egil, giftist við Herman Christiansen í Havn, har tey búsettust. Hon var ein av stovnarunum og fyrsti formaður í S&K felagnum. Tey fingu børnini Sørin f. 1947, Jens Christian f. 1949 og Birita f. 1951.

**Thorstein** f. 1925. Giftur við Óluvu f. Jacobsen úr Fuglafirði. Tey fingu døturnar Anna f. 1947 og Jacobina f. 1949.

**21. Marts**

Var kun oppe til Kl. 4, da jeg følte mig lidt sløj. Dog spadserede jeg to gange. Hilste paa lærer Kristoffersen, Breidal m.fl. Om Eftermiddagen havde jeg besøg af fru Sloan, hvilket jeg blev meget glad for. Vi sad og passiarede "í eina góða løtu" sammen.

Breidal og frú Sloan hava verið tveir sera ymiskir persónar. Breidal var kendur sum íslendskur fotografur sum drakk illa. Tað var hann, sum segði, tá ið onkur klagaði um myndirnar, at "man kan ikke lave smukke billeder af grimme skorte."

Frú Sloan var Elspa, sum var gift við "gamla" William Sloan. Hon var systir Djóna i Geil, sum var pápi Onnu Ziska, Pól, Kristin og Petur Alberg í Geil, sum øll á sín hátt settu spor eftir seg. Elspa var annars roknað fyri at vera ein góður sjónleikari í ungum aldri, nakað sum tó ikki er ókent fyri tey í Geil. Ein ættarmaður er Eyðun Johannesen, sum er abbasonur Kristin.

**24. Marts**

Dr. Hansen halede tre Tænder ud paa mig, hvilket gik meget godt. Bedre end jeg havde ventet.

**26. Marts**

Í gjár hoyrdist róp sum sjáldsom eru nú um stund: Grindaboð. Ein stór grind lá út fyri Kirkjubø og deyðspøk var hon. Tíverri eydnaðist ikki at gera enda á henni. Hon streyk til havs.

**31. Marts**

Egil hevði fingið trekt tenn dagin fyri, og nú hevur hann so nógva pínu í tannkjøtinum. "Laa og læste hele dagen i Det nye Testamente og En Pilgrims Vandring. Skrev et lille Brev til Martin i Sumba." Nú merktist, at Egil er við at gerast andaligur.

Vitjan av Malenu í Grótinum.

**10. april**

Da det var Abbas fødselsdag, havde jeg af den grund mange besøgende. Dagin eftir hevur hann vitjan av Rikku, dóttir Ludda Kjelnæs, ið ungur fór til Klaksvíkar at arbeiða hjá Faktorinum.

**Den 20. April**

Da jeg havde høj Feber blev jeg liggende hele Dagen. Sendte følgende Artikel ind til Redaktionen af Naade og Sandhed:



*Útróður var lív og lagna hjá teimum á Heygnum í Klaksvík. Hetta sæst eisini aftur í listini hjá langommusoni Ammalenu á Heygnum, Amariel Norðoy. Her er tað útróðrarbáturin Norðan hjá pápa hansara*

# Frelsen i Kristus

**Thi hver den, som paakalder Herrens Navn, skal vorde Frelst**
**Rom 10,13**

Naar man taler med Mennesker om Frelsen i Kristus, bliver de ofte mere eller mindre misfornøjede, ja, mange bliver endog vrede. Det mener de er ikke noget man skal tale om; jeg har hørt mange Mennesker udtale sig saaledes: "Vi har ikke lov til at sige, at vi er frelste, thi det er ikke noget, som vi kan vide Besked om." Gaar man nærmere ind paa disse mennesker, vil man snart opdage, at de ikke har megen Kendskab til den hellige Skrift, og de er gerne saadanne, der aldrig gør brug af deres Bibel. Læser, er du af samme Mening og tror, at "vi" ikke kan vide Besked om Frelsen, da er du fejl underrettet. Du er paa en forkert Vej, thi de som er frelste ved det, om end andre ikke ved Besked herom. Lad os imidlertid se, hvad Guds Ord siger og lærer desangaaende. Jeg skal nævne nogen Skriftsteder, der viser os klart og tydeligt, at den som tror paa Kristus, er frelst. Jeg maa derfor bede Læseren om nøje at overtænke følgende skrifsteder:

"Thi saa har Gud elsket Verden, at han gav sin Søn den enbaarne, for at hver den, som tror paa ham, ikke skal fortabes, men have evigt Liv; thi Gud sendte ikke sin Søn til Verden for at dømme Verden, men for at Verden skulde blive **frelst med Ham**. (Joh. 3.16-18.)

"Og det skal ske, hver den, som paakalder Herrens Navn, **skal blive frelst**." Ap.G. 4,12.

"Dersom du med din Mund bekender, at Jesus er Herre og i dit Hjerte tror, at Gud opvakte ham fra de døde, **da skal du være frelst**. (Rom. 10,8-10.)

Saaledes kunde der nævnes en hel del andre Skriftsteder, der viser os klart og tydeligt, at den der tror paa Jesus, **er frelst**.

Læser, hvis du ikke endnu har modtaget Vorherre Jesus som din personlige Frelser, da gør det **nu**. Ven, opsæt det ikke, men gør det **nu**, og du vil blive evig lykkelig fra samme stund af. Af sidstnævnte Skriftsted kan vi jo ogsaa se, at vi bør bekende Jesus som vor Herre. Er du en troende, saa skam dig aldrig ved at tale med andre om Jesus; husk Jesu egne alvorlige ord til os Mennesker:

"Thi dem som skammer sig med Mig og mine Ord i denne utro og syndige Slægt, ham skal ogsaa Menneskesønnen skamme sig ved, naar han kommer i sin Faders Herlighed med de hellige Engle. (Markus 8,38).

Da disse Sandheder har bragt mig Livets største Glæde, baaret mig op i Sygdommen og gjort Fremtiden og Evigheden lys og til at lyde med Glædessang, ønsker jeg til slut: Gud give, at disse ord maatte komme en eller anden søgende Sjæl til gode.

**Thorshavn i April 1918.**
**Egil Djurhuus**

**Komandi partur:**
Í komandi parti nærkast endanum á hesi søgu. Abbin, Faktorin, andast. Egil skal enn eina ferð fara niður at fáa sær heilsubót, men hann doyr áðrenn.